

# FARLOYVISSTARV SUM LEIÐSLUSKRIVARI

## Løgmansskrivstovan leitar eftir nýggjum leiðsluskrivara. Trívist tú mitt í politiska maskinrúminum, har ferðin mangan er høg? So er hetta møguliga rætta starvið til tín.

**Stutt um starvið**
Sum leiðsluskrivari ert tú partur av Ritara- og stjórnartænastuni á Løgmansskrivstovuni og skrivari hjá løgmanni og løgmansstjóranum. Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og fjølbroytt skrivarastarv, har tú hevur møguleika at koma heilt inn í politiska maskinrúmið. Tú fært ábyrgd av kalendara, fundarfyrireikingum og journalisering. Harafturat fevna uppgávurnar um eitt nú:

· At samskipa og fyrireika tilfar til landsstýrisfundir og stjóraráðsfundir
· Ábyrgd av at dagføra landsstýrisfundarprotokoll og ymisk yvirlit
· Avgreiðslu av fyrispurningum og nevndarinnkallingum frá Løgtinginum
· Rættlestur av eitt nú brøvum og uppritum
· Protokollvirksemi í samband við útlendskar vitjanir

**Stutt um teg**
Vit vænta, at tú hevur viðkomandi útbúgving og royndir innan skrivstovuyrkið ella innlit í fyrisiting. Vit leita vit eftir einum persóni, sum hevur eitt jaligt arbeiðslyndi og trívist við nógvum ymiskum uppgávum. Sum leiðsluskrivari hevur tú nógv innanhýsis og uttanhýsis samskifti, og tí er umráðandi, at tú hevur góð samstarvsevni, ert fyrikomandi og hevur góðar málsligar førleikar. Til tíðir kunnu uppgávurnar vera nógvar og tíðartrýstið stórt, og tá er týdningarmikið, at tú dugir væl at  skipa teg í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið. Talan er um eitt barnsburðarfarloyvisstarv fulla tíð, og starvið er tíðaravmarkað frá 15. august 2024 og umleið 1 ár fram.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, lívsrensli og øðrum skulu sendast til starv@tinganes.fo.

**Freistin at søkja starvið er 23. mai 2024 kl. 12.00.**

*Vilt tú hoyra meira?*
*Um tú hevur spurningar um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til*
*Pól R. Wolles, deildarstjóra, á telduposti: polrw@tinganes.fo og telefon: 504705.*

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**
Prime Minister's Office